UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
INNANHÝSIS

Dagf. 11.02.2020
J.Nr.: 20/00462
Viðgj.: SPS

Frágreiðing um uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)

1. Orsakir til uppskotið

Hvítvask av pengum og fígging av yvirgangi fara oftast fram í altjóða høpi, og Føroyar eru partur av altjóða samstarvinum innan karmarnar av FATF (Financial Action Task Force) um at fyribyrgja hvítvaski av peningi og fígging av yvirgangi. FATF ger tilmælir um tiltøk at fyribyrgja hvítvaski av peningi og fígging av yvirgangi. Tey seinastu tilmælini eru frá 2012.

Sum partur av altjóða samstarvinum innan karmarnar av FATF hava Føroyar skyldu at tryggja, at FATF-tilmælini verða framd í føroyskari lóggávu.

Við hesum uppskotinum verða seinastu FATF-tilmælini framd á yvirtiknum málsøkjum.

2. Galdandi reglur

Seinastu FATF-tilmælini eru frá 2012. Í grannalondunum eru FATF-tilmælini framd í lóggávuni innanfyri karmarnar av ES-direktivum.

Á ikki yvirtiknum málsøkjum eru seinastu FATF-tilmælini framd við hvítvaskfyriskipanini, t.e. "Anordning nr. 813 af 12. august 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven)". Hvítvaskfyriskipanin fevnir m.a. um peningastovnar, aðrar fíggjarfyritøkur, peningaflytingarfyritøkur og advokatar. Hvítvaskfyriskipanin byggir á 4. hvítvasdirektiv, t.e. "Eurpa- paralmentets og Rådets Direktiv (EU) 2015/849 af 20. maj 2015 om forebyggende foranstaltninger mod anvendelse af det finansielle system til hvidvask af penge eller finansiering af terrorisme".

Galdandi hvítvasklóg á yvirtiknum málsøkjum er løgtingslóg nr. 56 frá 9. juni 2008 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr 56 frá 26 mai 2010 (síðani nevnd hvítvasklógin). Lógin fevnir um fyritøkur á yvirtiknum máløkjum, t.e. fíggjarligarfyritøkur, m.a. lívstryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar, tryggingarmeklarar, umframt ávísar fyritøkur, sum ikki eru fíggjarligar fyritøkur, m.a. grannskoðarar og ognarmeklarar. Lógin byggir á 3. hvítvaskdirektiv frá 2005.

Lóggávan áleggur fyritøkum og persónum, fevnd av lógini, skyldur fyri at fyrbyrgja, at fyritøkan ella persónurin verða misnýtt til hvítvasking og fígging av yvirgangi. Tað snýr seg m.a. um kontantgjaldsforboð, kanningarskyldur viðvíkjandi transaktiónum hjá kundum og fráboðan til Statsadvokaten for Særlig Økonomisk Kriminalitet (SØIK), krav um kunnleika um kundan (legitimasjónskrøv), krøv um eigaraviðurskiftini hjá kundanum, undir hesum legitimasjónskrøv viðvíkjandi veruligum eigarum, herd legitimasjónskrøv, m.a. við politiskt ábærum persónum, sum eru búsitandi í einum øðrum landi, varðveitslu av

samleikaupplýsingum um kundan, innanhýsis reglur um kundalegtimasjón, fráboðan, váðameting og váðastýring og útbúgving av starvsfólki, umframt skráseting og eftirlit.

3. Endamálið við lógaruppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at tryggja, at Føroyar viðvirka í altjóða stríðnum móti hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi.

Uppskotið skal viðvirka til, at tað verður forðað fyri, at brotsfólk misbrúka føroyskar fyritøkur og fíggjarligu skipanina til at hvítvaska pengar og at fíggja yvirgang soleiðis, at tað verður forðað fyri skaða á fíggjarliga støðufestið og álitið á fíggjarligu skipanina.

4. Høvuðstættir í uppskotinum

Lógaruppskotið byggir eins og hvítvaskfyriskipanin á 4. hvítvaskdirektiv.

Uppskotið áleggur, eins og galdandi lóg, fyritøkum og persónum skyldur fyri at fyrbyrgja, at fyritøkan ella persónurin verða misnýtt til hvítvasking og fígging av yvirgangi.

Løgskipanin av økinum eftir uppskotinum broytist frá at vera ein í høvuðsheitum reglubundin skipan til at vera meira váðagrundað. Tað ger, at virksemið bæði hjá fyritøkum og persónum og myndugleikum kann verða meira miðvíst og virkið soleiðis, at virksemið verður nýtt, har váðin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi er størstur.

Eftir galdandi reglum er tað kundakunnleikamannagongdin, sum er mest tyngjandi í dagliga rakstrinum. Krøvini hava við sær, at fyritøkan skal kenna sínar kundar fyri at meta um, hvør váði fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi er knýttur at einstaka kundanum.

Upplýsingar um kundan skulu dagførast alla ta tíð, kundaviðurskiftini standa við, og kundin skal eftiransast m.a. fyri at eyðmerkja transakjónir, sum kunnu hava tilknýti til hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Eftir uppskotinum verður tað latið til fyritøkurnar at gera eina meting soleiðis, at kundaviðurskifti við lítlum váða ikki hava við sær somu tyngjandi krøv sum kundaviðurskifti við størri váða. Alment fara fyritøkur, har váðin er lítil fyri, at tær vera mísnýttar til hvítvasking ella fígging av yvirgangi, at fáa minni tyngjandi krøv.

5. Lógarøkið

Lógarøkið eftir uppskotinum er í høvuðsheitum tað sama sum eftir galdandi hvítvasklóg, tó serliga hesi broyting:

Fyritøkur og persónar, sum bjóða út spøl, verða fevnd av uppskotinum, men kunnu eftir eini váðameting verða undantikin. Flestu spøl, sum í dag verða boðin út, kunnu undantakast. Spøl, sum verða boðin út sambært avtalu millum Sp/f ítróttarvedding og Danske Spil, eru undir danskari lóggávu og eftirliti.

6. Kontantgjaldsforboð

Eftir § 2 í galdandi hvítvaskløgtingslóg er tað forboðið handlandi og uppboðssølufólki at taka ímóti upphæddum í reiðum peningi áljóðandi kr. 100.000 ella meira, annaðhvørt goldið verður í einum ella fleiri gjøldum, ið sýnast at vera innanhýsis samanhangandi.

Kontantgjaldsforboðið er galdandi fyri fyritøkur og persónar, sum annars ikki eru fevnd av hinum áetingunum í hvítvasløgtingslógini. Tað er bert galdandi fyri handlandi við lutum og uppboðssølufólki.

Eftir uppskotinum verður kontantgjaldsforboðið víðkað til at fevna um øll vinnurekandi, og markið verður lækkað frá 100 tús. kr. til 50 tús. kr.

7. Váðameting og váðastyring

Eftir galdand reglum er bert krav um innahýsis skrivligar reglur um váðmeting, men ikki nærri reglur um hetta í lógini.

Í uppskotnum eru meira nágreiniligar reglur og krøv um váðameting:

Fyritøkur og persónar skulu eyðmerkja og meta um váðan fyri, at fyritøkan ella persónurin kunnu verða misnýtt til hvítvask ella fígging av yvirgangi. Váðametingin skal gerast við støði í handilsmodellinum hjá fyritøkuni ella persóninum, og skal fevna um metingina av váðafaktorum, sum eru knýttir at kundum, vørum, tænastum og transaktiónum umframt veitingarvegum og londum ella landafrøðiligum økjum, har handilsvirksemi er. Váðametingin skal skjalprógvast og støðugt dagførast. Í skjali 1 og 2 til uppskotið er yvirlit við faktorum og skjalasløgum, ið eyðkenna støður, sum kunnu hava við sær øktan váða ella minni váða:

Eftir uppskotinum er heimild at áseta reglur um undantak at gera individuella váðameting.

Undantaksmøguleikin kann verða nýttur á økjum, har tann serligi váðin í sambandi við vinnugeiran er einfaldur, og har tað í tí vinnugreinini er greið fatan av, hvør váðin er. Hetta kann t.d. vera viðkomandi í sambandi við tvungnar pensjónsskipanir, sum eru stovnaðar í sambandi við starvssetanir.

Skotið verður upp at seta krøv til fíggjarligar fyritøkur, sum eftir aðrari lóggávu hava slík krøv um comliancebyrgda og innanhýsis grannskoðan ella audit og krav um screening av starvsfólki viðvíkjandi revsiverdum viðurskiftum og førleikum.

8. Kundakunnleikamannagongdir

8.1. Almenn krøv

Kundakunnleikamannagongdir eftir galdandi reglum halda í høvuðsheitum fram, undir hesum at kundasambond alsamt skulu eftiransast, tó við ávísum nágreinginum og broytingum.

Eftir galdandi reglum skulu kundakunnleikamannagongdir gjøgnumførast, tá eitt fast kundasamband verður stovnað. Tað heldur fram eftir uppskotinum.

Skotið verður upp at seta nýggja áseting við kravi um, at kundakunnleikamannagongdir eisini skulu gjøgnumførast, tá týðandi umstøður broytast hjá einum kunda, og annars hóskandi tíðir.

At umstøður broytast kann t.d. vera, tá tað eru upplýsingar um, at tað í eini fyritøku, sum er kundi, eru hendar broytingar í eigara- og ræðisviðurskiftunum.

Hóskandi tíðir merkir, at tað við hóskandi jøvnum millumbilum skulu gjøgnumførast kundakunnleikamannagongdir fyri at tryggja, at tær upplýsingar, ein fyritøka ella persónur hevur um ein verandi kunda, eru rættar og nøktandi. Tað kann ikki verða vikið frá kravinum, heldur ikki fyri kundar við avmarkaðum váða, men um longdin á kundasambandinum er avmarkað, kann ein váðameting hava við sær, at nýggjar kundakunnleikamannagongdir ikki skulu gjøgnumførast.

Allar kundakunnleikamannagongdir skulu gjøgnumførast, men hvussu viðfevndar tær skulu vera, verður avgjørt eftir eini váðameting. Í skjali 1 og 2 til uppskotið er yvirlit yvir tættir, sum í minsta lagi skulu takast við, tá metast skal um, hvussu víðfevndar kundakunnleikamannagongdir skulu vera.

Fyritøkur og persónar skulu eins og eftir galdandi lóg fáa til vega samleikaupplýsingar um tann ella teir veruligu eigararnar, og skulu fremja hóskandi tiltøk fyri at kanna samleikan hjá tí ella teimum. Fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av uppskotinum, kunnu nýta eina komandi skrá yvir veruligar eigarar, sum Skráseting Føroya skal føra, til at stuðla undir arbeiðið hjá fyritøkum og persónum at lúka skyldurnar eftir uppskotinum.

Áðrenn stovnan av einum handilssambandi verður framd við eini stakari transaktión ella gjøgnumførslu av eini slíkari fyri likamligar persónar, skulu fyritøkur og persónar, fevnd av uppskotinum, kunna kundan um tær reglur, sum galda fyri viðgerð av persónsupplýsingum í sambandi við fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi. Hetta er nýggj áseting.

8.2. Herd krøv um kundakunnleikamannagongdir

Fyritøkur og persónar, fevnd av uppsotinum, skulu afturat almennu krøvunum gera herdar kundakunnleikamannagongdir, um mett verður, at vandin fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi er øktur. Fyritøkan ella persónurin skulu hava við í metingini teir háváðafaktorar, sum standa í skjali 2 til uppskotið, og aðrar háváðafaktorar, sum mugu metast at hava týdning.

Fyritøkur og persónar skulu gera herdar kundakunnleikamannagongdir, um kundin hevur heimstað í einum landi, sum stendur á yvirlitinum hjá Europa-kommissiónini yvir lond, har mett verður, at øktur vandi er fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi**.**

Hesar broytingarnar eru umorðing av galdandi reglum soleiðis, at tað greitt gongur fram, at eftir uppskotinum kunnu vera fleiri kundaviðurskifti við øktum váða enn eftir galdandi reglum.

8.2.1. Herd krøv um kundakunnleikamannagongdir viðvíkjandi politiskt ábærum persónum

Í galdandi hvítvasklóg eru ásettar herdar kundakunnleikamannagongdir viðvíkjandi politiskt ábærum persónum.

Eftir uppskotinum skulu fyritøkur og persónar, fevnd av hesi løgtingslóg, hava mannagongdir til tess at taka støðu til, um kundin, veruligi eigarin hjá kundanum, njótanartilskilaði sambært tryggingarskjalinum ella veruligi eigarin hjá njótanartilskilaða er ein persónur, sum er politiskt ábærur, ella ein nærstandandi ella tættur samstarvsfelagi til ein persón, sum er politiskt ábærur.

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar í minsta lagi 12 mánaðir eftir, at viðkomandi politiskt ábæri persónurin steðgar í starvi sínum, skal gera eina meting av, um kundaviðurskifti hava við sær øktan váða fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Eftir uppskotinum verða krøvini víðkað við tað, at skotið verður upp at seta herd krøv viðvíkjandi veruligum eigarum, njótanartilskilaðum sambært lívtryggingarskjølum umframt veruligum eigarum av njótanartilskilaðum, sum eru poltiskt ábærir persónar.

Herd eftiransing skal vera av einum handilssambandi við ein persón, sum er politiskt ábærur, ella ein nærstandandi ella tættan samstarvsfelaga til ein persón, sum er politiskt ábærur.

Galdandi lóg fevnir um politiskt ábærar persónar, sum eru búsitandi í einum øðrum landi. Eftir uppskotinum verður allýsingin í uppskotinum av politiskt ábærum persónum víðkað soleiðis, at lógin eisini fevnir um persónar búsitandi her á landi, leiðsluna í politiskum flokkum og leiðsluna í altjóða stovnum.

Eftir uppskotinum skal landsstýrismaðurin gera ein lista við nøvnum á politiskt ábærum persónum. Listin skal vera alment atkomuligur. Eftir uppskotinum ásetur landsstýrismaðurin reglur um gerð av listanum undir hesum um fráboðanarskyldu hjá stovnum o.a. í sambandi við gerð av listanum og um almannakunngering. Ásetingin er nýggj.

Við heimildini kunnu tað m.a. ásetast nærri reglur um teir løgfrøðiligu persónar, myndugleikar og feløg o.a., sum hava starvsviðurskifti við ein politiskt ábæran persón, skulu fráboða viðkomandi navnaupplýsingar til myndugleikan, sum stendur fyri at gera listan, og fráboða dagføringar í sambandi við, at ein poltiskt ábærur persónur fer úr starvi ella broytingar í starvsviðurskiftunum o.a.

Tað er mest hóskandi, at skyldan at fráboða verður áløgd tí løgfrøðiliga persóni, myndugleika og felagi o.a., og ikki einstaka politiskt ábæra persóninum við tað, at starvsstaðið hevur betri møguleika at seta í verk tryggar mannagongdir, sum tryggja, at neyðugu fráboðanirnar verða framdar í sambandi við broytingar í starvsviðurskiftunum o.a.

Eftir hvítvaskfyriskipanini skal danski vinnumálráðharrin eisini gera ein lista við nøvnum á politiskt ábærum persónum. Ætlanin er, at danski vinnumálráðharrin við heimild í hvítvasfyriskipanini setur í gildi "Bekendtgørelse om indberetning og offentliggørelse af oplysninger om politisk eksponerede personer på Færøerne."

Listin, sum danski vinnumálaráðharrin ger eftir hvítvaskfyriskipanini, og listin sum landsstýrismaðurin ger eftir uppskotinum, fevna um somu stovnar o.a. og somu persónar. Fyri at sleppa undan dupultari umsiting er ætlanin tí, at landsstýrismaðurin kann nýta heimildina soleiðis, at víst verður til listan, sum danski vinnumálaráðharrin ger við heimild í hvítvaskfyriskipanini.

9. Whistleblowerskipan

Skotið verður upp í § 33, at sett verður í verk ein Whistleblowerskipan fyri fyritøkur, fevndar av lógaruppskotinum, og sum ikki longu eru fevndar av eini slíkari skipan. Fyri lívstryggingarfeløg er ætlanin, at ein slík skipan verður sett í verk við broyting í løgtingslógini um tryggingarvirksemi.